Kappingarráðið

**Advokatskrivstovan**
Frúutrøð 4
Postboks 6
FO-110 Tórshavn

Att: Niels Winther Poulsen

Tórshavn, 16.desember 2008

J.nr.: K600-2008053
Viðgjørt: S.R.
Tygara ref:

**Viðvíkjandi: P/f Von yvirtekur P/f Føroya Trol**

## Samandráttur

Niels Winther Poulsen, adv. hevur við gildi frá 25. november 2008 fráboðað Kappingareftirlitinum, at P/f Von yvirtekur P/f Føroya Trol.

P/f Von er holdingfelag sum varð stovnað í 2008, tá samtøkini P/f Vónin og norska Refa Frøystad Group løgdu saman. Føroyingar eiga meirilutan av partapeninginum í P/f Von. Holdingfelagið eigur fleiri dóttirfeløg, sum framleiða trol og annan fiskireiðskap. P/f Føroya Trol var stovna í 2005 og hevur heimstað í Vestmanna. Felagi framleiðir botntrol burturav.

Luttakandi fyritøkurnar hava avtala, at P/f Von yvirtekur meiriluta av partapeninginum í P/f Føroya Trol, og at ein av fyrrverandi eigarunum verður settur sum sølustjóri í P/f Vónini.

Luttakandi fyritøkurnar hava avgjørt at leggja saman, tí føroyski marknaðurin vantandi fer at minka munandi komandi árini, og tí tær meta, at tær saman fara at standa sterkari á norðuratlantiska marknaðinum.

## Heimildir

Talan er um eina yvirtøku sambært Kappingarlógini § 13, nr. 1, tí P/f Von fær ræðið og harvið avgerandi ávirkan á P/f Føroya Trol.

Tann samlaði umsetningurin hjá viðkomandi fyritøkum er omanfyri 75 mió. kr. í Føroyum, og hava í minsta lagi tvær av fyritøkunum ein umsetning, sum er omanfyri 4 mió. kr. Samanleggingin skal sostatt eftir § 14, stk. 1 í Kappingarlógini fráboðast Kappingareftirlitinum og er fevnd av § 14, stk. 2, nr. 3 í lógini.

Hetta merkir, at Kappingarráðið skal viðgera samanleggingina eftir § 15 í Kappingarlógini við atliti at kanna, um samanleggingin hevur við sær, at virkna kappingin á marknaðinum verður skerd.

## Avgerð

Kappingarráðið hevur, á fundi tann 16. desember 2008, avgjørt at góðkenna yvirtøkuna, tí hon ikki forðar fyri kapping, við tað at ein marknaðarráðandistøða verður skapt ella styrkt, sambært Kappingarlógini §15.

Kappingarráðið hevur avgjørt at góðkenna tann kappingarklausul, sum komandi sølustjórin og P/f Von hava avtalað. Sostatt verður sáttmálin millum hesar góðkendur sum atknýtt avtala, ið tráð við tað linju sum Kappingarráðið legði við avgerð tann 9. juli 2008[1].

[1] K600-2008015 Samanlegging millum P/f Dimmalætting og P/f Vinnuvitan

# Málslýsing

## Avtalan

Kappingareftirlitið fekk tann 25. november 2008 fráboðan frá Niels W. Poulsen, adv., um at P/f Von hevði gjørt avtalu um yvirtøku av P/f Føroya Trol. Kappingareftirlitið hevur, tann 27. november 2008, boðað Niels W. Poulsen, adv.,frá at fráboðanin er fullfíggjað, og at málið verður viðgjørt eftir §15 í Kappingarlógini.

Núverandi eigarar av P/f Føroya Trol og P/f Von hava gjørt eina avtalu sínámillum, um at P/f Von yvirtekur meirilutan av partabrøvunum í P/f Føroya Trol fyri xxxx. Ein partur av keypsupphæddini verður goldin kontant og ein goldin í partabrøvum í P/f Von.

Umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum í 2007, sambært kunngerð nr. 9 frá 11. mars 2008, var:

**Talva 1: Samtaks umsetningurin**

*(Kappingarráðið hevur valt ikki at almannakunngera hesar upplýsingar)*

Sostatt skal yvirtøkan viðgerast eftir §15 í Kappingarlógini, sambært Kappingarlógini §14, stk. 2, nr. 3. Hetta merkir, at tað er álagt Kappingarráðnum, at kannað um yvirtøkan hindrar virknari kapping við tað, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkt.

## Atknýtt avtala

Sambært fráboðara er ein týðandi partur av avtaluni, at ein av eigarunum, xxxx, tekur við sum xxxx í P/f Vónini. Í hesum sambandi hava partarnir, xxxxx og P/f Vónin gjørt ein starvssáttmála, ið hevur ein kappingarklausul í §8. Hesin sigur í stuttum, at:

Fer stjórin úr stavi, kann hann ikki í einum tíðarskeiði uppá 2 ár:

- ✓ byrja fíggjarligt virksemi, sum heilt ella partvís kappast við virksemið hjá felagnum,
- ✓ hava fíggjarlig áhugamál í virksemi, sum heilt ella partvís kappast við virksemið hjá felagnum,
- ✓ vísa møguligum kundum til aðrar, sum heilt ella partvís kappast við virksemið hjá felagnum,
- ✓ verða settur í starv í slíkt virksemi, sum heilt ella partvís kappast við virksemið hjá felagnum,
- ✓ arbeiða fyri virksemi, sum heilt ella partvís kappast við virksemið hjá felagnum,

Kappingarklausulurin er ikki galdandi, um sølustjórin verður sagdur úr starvi uttan rímiliga grundgeving, ella um sølustjórin sjálvur sigur upp, og uppsøgnin er grundað á, at felagið ikki hevur hildið skyldur sínar mótvegis stjóranum.

## Partarnir

**P/f Føroya Trol – Skráset. nr. 4128**

P/F Føroya Trol varð sett á stovn í 2005 og hevur heimstað í Vestmanna, har framleiðsluhøll og skrivstova er. Virkið hevur lagt seg eftir at framleiða og selja botntrol burturav. Umleið 90% av umsetninginum stavar frá sølu av botntroli.

P/F Føroya Trol hevur  gott samstarv við Hampiðjan Group, sum eisini er partaeigari í virkinum, og sum eigur virkir kring allan heimin.

**Talva 2: Roknskapartøl hjá Føroya Trol**

*(Kappingarráðið hevur valt ikki at almannakunngera hesar upplýsingar)*

**P/f Von – Skráset. nr. 5215**

Tann 4 juli 2008 avtalaðu P/f Vónin og norska Refa Frøystad Group, at leggja saman. Hetta var gjørt við at feløgini vóru løgd undir holdingfelagi, P/f Von. Sostatt eru P/f Vónin og dótturfeløg og RFG og dótturfeløg í sama samtaki.

Ognarbýti í P/f Von er P/F Kerið xxx (FO), P/f TF Holding xxx (FO), A/S Havila xxx (NO) og Frøystad family 17% xxxx.

**P/f Vónin – Skráset. nr. 136**

P/f Vónin var sett á stovn í 1969 og hevur heimstað í Fuglafjørði. Virkið selur botntrol, nótir, flótitrol, rækjutrol, umframt at veita net til aliringar. Umleið  19% av umsetninginum stavar frá sølu av botntroli. P/f Vónin hevur fimm dótturfeløg, tvey føroysk, tvey kanadisk og eitt grønlendskt. P/f Vónin eigur stóran minnilutapart í øðrum føroyskum kappingarneyta[2].

**Talva 3: Roknskapartøl hjá P/f Vónini**

*(Kappingarráðið hevur valt ikki at almannakunngera hesar upplýsingar)*

**Samtakið P/f Von**




[2] P/f Vónin eigur xxxx av P/f Trolverkstaðinum Bergið

## Føroyskir marknaðurin

Tað eru fýra veitarar av trolum í Føroyum. Hesir eru P/f Vónin, P/f Trolverkstaðið Bergið, P/f Føroya Trol og P/f Síl Net. Av hesum framleiða allir botntrol uttan P/f Síl Net. Á mynd 1, sæst marknaðarparturin hjá øllum trolveitarum í Føroyum.

Mynd 1: Marknaðarpartar hjá trolveitarum í Føroyum

*(Kappingarráðið hevur valt ikki, at almannakunngera hesar upplýsingar)*

Sum tað framgongur á mynd, er miðsavningin stór. P/f Vónin eigur xxxx meðan Føroya Trol eigur xxxx. Somuleiðis skal havast skal í huga, at P/f Vónin eigur xxxx av P/f Trolverkstaðnum Bergið. Tað er tí onki ivamál, um at marknaðarstøðan hjá P/f Vónini í Føroyum styrkist og at talan er um ráðandi marknaðarstøðu, sum styrkist eftir av yvirtøkuni.

## Viðkomandi marknaður

Sambært Kappingarlógini §5 verður skilmarking av viðkomandi marknaði gjørd við eini kanning av eftirspurningarvaraseting, útboðarvaraseting og møguligari kapping. Sambært lógarviðmerkingunum til §5 í lógini stendur, at møguligt er eisini at brúka onnur metingarstøði enn tey nevndu.

Fyri at staðfesta hvør viðkomandi marknaðurin er, skilmarkast viðkomandi vørumarknaður og viðkomandi landafrøðiligi marknaður. Viðkomandi vørumarknaðurin er marknaðurin fyri tær vørur, ið brúkarin metir kunnu varasetast, orsaka av eginleika, prísi ella nýtslu[3]. Viðkomandi landafrøðiligi marknaðurin er tað øki, har luttakandi fyritøkurnar avseta sínar vørur og har hava kappingarumstøður eru nøkulunda eins, og sum kunnu skiljast frá grannaøkjum, av tí at kappingarumstøðurnar har eru munandi øðrvísi[4].

Við eftirspurningsvaraseting verður mett um hvørjar vørur kunnu koma ístaðin fyri tær vørur, sum luttakandi fyritøkurnar selja. Her skal kannast hvussu brúkarin uttan iva fer at bera seg at, um lutfalsligu prísirnir á vørunum hjá luttakandi fyritøkunum økist og verður verandi[5].

Útboðsvaraseting hevur til endamáls, at staðfesta um tað eru veitara, ið kunnu umstilla sína framleiðslu til viðkomandi vørurnar og marknaðarføra hesar innan styttri tíðarskeið, uttan týðandi meirkostnað og váða[6].

P/f Vónin framleiðir botntrol, nótir, flótitrol, rækjutrol, og net til alivinnuna. P/f Føroya Trol framleiðir bert botntrol. Viðkomandi vøran er botntrol og viðkomandi vørumarknaður er marknaðurin fyri botntrol. Tað letur seg ikki gera at skilmarka vørumarknaðin breiðari enn hetta. Eitt nú kunna onnur trolsløg ikki varasetast fyri botntrol. Hinvegin letur tað seg væl gera og uttan stóran kostnað, at framleiðarar av øðrum sløgum av trolum, leggja sína framleiðslu um til botntrol.

Sambært fráboðara krevur tað ikki serliga stóra íløgu, at byrja virksemi innan hesa vinnu. Tað krevst ein knívur og eitt høli. Kappingarneytar eru ikki einans framleiðarar, men eisini fyritøkur sum hava umboð.

---

[3] Konkurrenceloven med kommentar af Kirsten Levinsen (2001, s. 141)
[4] Sambært lógarviðmerkingunum til §5 í Kappingarlógini
[5] Konkurrenceloven med kommentar af Kirsten Levinsen (2001, s. 141)
[6] Sambært lógarviðmerkingunum til §5 í Kappingarlógini

Fráboðari metur, at viðkomandi landafrøðiligi marknaðurin er alt norðuratlantshav, tí reiðarí keypa vanligani trol, har tey landa sína veiðu. Hetta merkir, at eftirspurningurin eftir troli ferðast millum einstøku londini, alt eftir hvar reiðaríini fiska. Tí er tað vanligt, at einstøku veitararnir hava umboðsmenn á ymsu plássunum, t.d. er Síl Net umboð hjá útlendskum veitara.

Fráboðari metir, at luttakandi fyritøkurnar hava rættuliga nógvar kappingarneytar í norður atlantshavi. Fráboðari nevnir fyritøkur sum, Hampiðjan Hf, Egersund Trawl A/s, Cosmos A/s, Mørenot A/s og Selstad Trawl A/s. Á mynd 2 er umsetningurin hjá hesum og hjá P/f Vónini og Føroya Trol sammet.

Mynd 2: Umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum og nøkrum kappingarneytum

*(Kappingarráðið hevur valt ikki, at almannakunngera hesar upplýsingar)*

Sum tað framgongur av mynd 2, er P/f Vónin ein miðalstór fyritøka á viðkomandi marknaði og hevur tí neyvan eina marknaðarráðandi støðu á viðkomandi marknaði. Tað skal tó viðmerkjast, at mynd 2 vísir samlaða umsetningin hjá fyritøkum og teirra dótturfeløgum, og tí stavar neyvan allur umsetningurin frá sølu av trolum. Hvussu breitt virkisøkið hjá hvørjari einstakari fyritøku er, kann Kappingarráðið ikki siga nakað um. Hinvegin er marknaðarmakt hjá tí einstøku fyritøkuni eisini tengt, at hvussu stór fyritøkan er og hetta geva stabbarnir í mynd 2 eina ábending um.

## Fiskivinnan

Av tí at luttakandi fyritøkurnar millum annað veita til føroysku fiskivinnuna, hevur Kappingarráðið biðið fráboðaran um at koma við tølum, ið vísa hvussu stórur partur av samlaða kostnaðinum hjá einum skipi er fiskireiðskapur. Somuleiðis hava vit biðið fráboðaran um tøl, ið vísa, hvussu stórur partur av útreiðslunum til fiskireiðskap fara til trol.

Fráboðarin hevur fingið fatur á innanhýsistølum fyri tveir trolbátar. Hesi tøl eru at síggja í talvu 4. Fyri uttan tøl fyri hvøn bátin, eru miðaltal fyri báðar bátarnar og út frá hesum er miðaltal í procent av nettosøluni funnin.

Talva 4: Rakstrarkostnaður hjá tveimum føroyskum trolbátum

*(Kappingarráðið hevur valt ikki, at almannakunngera hesar upplýsingar)*

Tað framgongur av talvu 4, at serliga hýran er ein stórur postur, meðan fiskireiðskapur er tann minsti posturin. Fráboðari metir, at hesi tøl eru vísandi fyri trolbátarnar í Føroyum. Man kann tí, út frá hesum tølum, gera ta niðurstøðu, at útreiðslur til fiskireiðskap hava lutfalsliga lítlan týdning fyri lønsemi hjá trolbátunum.

Fráboðari er eisini komin við einari meting av kostnaðinum fyri ávísar skipaflokkar. Í talvu 5 er meting av kostnaðinum til fiskireiðskap útgreinaður eftir motorstødd. Tað framgongur av hesi talvu, at trol sum meginregla er ein lítil partur av samlaða kostnaðinum til fiskireiðskap.

Talva 5: Reiðskapskostnaðurin útgreinaður og býttur á bátastødd

*(Kappingarráðið hevur valt ikki, at almannakunngera hesar upplýsingar)*

## Onnur viðurskifti

Fráboðari metir, at føroyski marknaðurin fyri botntrol fer at minka munandi. Báðar fyritøkurnar fara vantandi at missa nógv av útistandandi peningi orsaka av, at skip fara á tvingsil- sølu. Somuleiðis verður mett, at føroyski marknaðurin fer at verða ov lítil, til at báðar fyritøkurnar kunnu halda fram. Tí hava partarnir avgjørt at leggja saman, fyri at kunna leggja størri orku í útflutning og fyri at savna serkunnleikan hjá báðum í eina eind.

Kappingarráðið hevur spurt seg fyri hjá Føroya Reiðarafelag, um teir hava somu áskoðan sum fráboðarin. Føroya Reiðarafelag ásannaði, at marknaðurin fer at minka munandi komandi tíðina. Í Føroya Reiðarafelag var niðurstøðan, at tað sjálvsagt er óheppið, at tað nú fór at vera ein veitari minni, men man helt ikki, at gongdin kundi verða øðrvísi. Føroya Reiðarafelag vildi tí ikki mótmæla, at yvirtøkan verður framd.

## Kappingarráðsins meting av samanleggingini

Kappingarráðið er yvirhøvur samt við teimum áskoðanum sum fráboðarin er komin við. Skilmarkingin av viðkomandi marknaði tekur Kappingarráðið undir við og er samt við bæði fráboðara og Føroya Reiðarafelag, um at markanðurin fyri botntrol fer at minka munandi. Undir tílíkum umstøðum, er tað av stórum týdningi at fyritøkur fáa møguleika fyri at konsolidera seg og søkja aðrar marknaðir.

Kappingarráðið metir, við støði í teimum tølum fyri kostnað sum fráboðarin er komin við, at kappingarføri hjá føroysku fiskivinnuni verður ónervað av hesi samanlegging. Kappingarráðið metir, at kostnaðurin til fiskireiðskap er lutfalsliga lítil og av hesum er kostnaður til trol, einans ein lítil partur.

Kappingarráðið metir ikki, at tað kann hugsast, at luttakandi fyritøkurnar fara at misnýta sína ráðandi støðu í Føroyum. Henda meting byggir á, at íløgan, sum skal gerast fyri at byrja virksemið, er rættuliga lítil. Somuleiðis er tað lætt hjá føroyskum fyritøkum at fáa umboð frá útlendskum veitarum. Tískil skuldi tað verði torført hjá luttakandi fyritøkunum at taka óvanliga høgan vinning yvir eitt longri tíðarskeið.

Eigarin í P/f Føroya Trol verður eftir yvirtøkuna sølustjóri í P/f Vónini. Í hesum sambandi hava partarnir skrivað ein starvssáttmála, har kappingarklausulur er. Kappingarklausulurin er settur til tvey ár.

Kappingarráðið metir, at kappingarklausulurin ikki fer út yvir tað sum er neyðugt, fyri at P/f Vónin kann tryggja virði á aktivinum sum verður handla. Sum fyrr nevnt krevst ikki stór íløga fyri at byrja virksemi og fráboðarin hevur lagt áherðslu á, at tað serliga er serkunnleikin hjá lyklapersónum í P/f Føroya Trol, ið man ynskir at fáa.

Kappingarráðið metir, at longdin á kappingarklausulinum er í trá við ES reglur og í tráð við tað linju, ið Kappingarráðið legði við síni avgerð frá tann 9. juli 2008[7].

## Niðurstøða

Kappingarráðið hevur avgjørt at góðkenna yvirtøkuna, tí hon ikki forðar fyri kapping, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkt, sambært Kappingarlógini §15.

[7] Avgerð viðv. samanleggingina millum P/f Dimmalætting og P/f Vinnuvitan (K600- 2008015)

Kappingarráðið

Kappingarráðið hevur avgjørt at góðkenna tann kappingarklausul, sum komandi sølustjórin og P/f Von hava avtala. Sostatt verður sáttmálin millum hesar góðkendur sum atknýtt avtala, ið tráð við tað linju sum Kappingarráðið legði við avgerð tann 9. juli 2008[8].

Vegna
Kappingarráðið

Ingunn Ó. Eiriksdóttir
Formaður

/Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

[8] K600-2008015 Samanlegging millum P/f Dimmalætting og P/f Vinnuvitan

Skálatrøð 20 · P. O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Telefon: +298 35 60 40 · Telefax: +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

Kappingarráðið